## Østergaard keypir inn

Nevndarformaðurin í FCK, Flemming Østergaard, vil ikki bert hyggja at, nú úrslitini hjá FCK ikki hava verið av teimum bestu. – Vit hava roynt hetta fyrr, og sjálvandi royna vit at læra av teimum mistøkum, sum eru gjørd. Og Flemming Østergaard leggur afturat, at felagið nú fer at styrkja um hópin. – Nú eri eg ikki tann, sum stendur fyri keyp og sølu av spælarum. Men eg haldi øll duga at síggja, at vit skulu hava ein skipara til miðvøllin, sigur hann Ekstra-Bladet.



## Mellberg varð fagnaður

Svenski landsliðsspælarin, Olof Mellberg spældi sína seinastu grannauppgerð fyri Aston Villa ímóti Birmingham ígjár. Og væl gekst í hond, Aston Villa vann 5-1, og Olof Mellberg legði upp til tað fyrsta málið, sum Young setti inn. Sami Young skeyt eitt mál aftrat. Norski spælarin, John Carew skeyt eisini tvey mál, og Agbonlahor skeyt fimta málið. Tá Mellberg var skiftir út eftir 85 minuttum spæl, var hann stórliga fagnaður av heimaáskoðarunum, sum sungu ein serligan sang til heiðurs fyri Mellberg. - Hetta føldist væl, vit sótu á øllum dystinum, frá byrjan til endan. Hetta er heilt ótrúligt. Ein slíkan sigur hevði eg unt fleiri fótbóltsspælarum at uppliva, segði Mellberg eftir dystin. Hann fer nú at spæla við italska Juventus.

## Sagt í 3. hálvleiki

**Ein partur av triðja hálvleiki á Rás2 eru SMS-boð frá lurtarunum. Í tann mun at tíðin røkkur, verða hesi boð lisin upp í sendingini. Og bestu SMS'ini verða eisini prentað í mánadagsútgávuni av Sosialinum.**

»Hi hi sníkti meg allíkavæl út à Svangaskarð í gjár sjálvt um e hevði fingið at vita at b68 vann, og vita tit hvat nsí vann:-) heilsan nsíarin«

»Tit mugu kunna finna útav, at einki eitur GÍ longur men VÍKINGUR!!! IRRITERANDI AT HOYRA TAÐ«

»Ongin hoyrir nakað til Kristan fjepparin hja KÍ. Tá man grevur eina grøv fyri ein annan, kann man enda i henni sjálvur, tit eru a djúpun vatni eins og undursjóðar tunnulin brúka teg minni heilsan vb fjeppari«

»Visiónin hjá KÍ 2009, verður tað at spæla seg uppaftur í Formuladeildina«

»KÍ má fara at renna niðan á Stakkin, teir orkaðu ikki at fylgja við HB!«

«Heri góði, tað kann ikki bera til, at EB/S gevur tað vekk tveir dystir á rað móti B71«

»Annars samlar Símin uppá kort frá byrjan. Hann fer at spæla "Hansen, Hansen" ístaðin fyri Olsen, Olsen«

»Varið tykkum, B71 kemur skjótt við einum fjepparafelag«

ÍF-Skála 1-0 (0-0):

# Ikki gerandisdagur í Fuglafirði




**Fótbóltslagið er sera gott í Fuglafirði, nú ÍF hevur fingið luft til botnstríðið. Fuglfirðingar hava vunnið tvær ferðir upp í slag, og tað var alt annað enn væntað undan kappingarbyrjan. Í einum keðiligum dysti skjeyt Balazs Sinkó einsamalla málið, tá Skála vitjaði**

*ÍF*

*Skála*

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*

### -Nú steðgar eingin okkum!

Tá eg royni at sníkja mær millum mongu áskoðararnar í dýrdarveðrinum eftir dystarlok, hoyri eg ein rópa til vinmannin. Tað var sjálvandi meint í spølni, men tað lýsir væl fótbóltslagið í Fuglafirði í løtuni. Hóast David Jones framvegis ikki sleppur at standa við síðulinjuna, so hevur ÍF, undir hansara leiðslu, vunnið tvær ferðir upp í slag í Formuladeildini. Tað er ikki vanligur gerandisdagur í Fuglafirði í hesum døgum, nú liðið longu hevur fingið luft til botnstríðið.

Hóast allir millum áskoðararnar eru hetjur, so vóru fuglfirðingnar serliga glaðir fyri Balazs Sinkó í gjár. Framrættaði miðvallarin stóð fyri einsamalla málinum í dystinum, sum samstundis var hansara fyrsta fyri ÍF.

### Lítið bit í

Vart tú ikki fjeppari við vøllin í Fuglafirði í gjár, mátti tú helst iðra teg um, at tú legði leiðina framvið. Fyrri hálvleikur hevði snøgt sagt einki at bjóða, og tú skuldi ikki vera serfrøðingur at síggja, at talan var um botndyst. Fleiri óneyðug mistøk vóru, lítið bit var í framrættaða spælinum, meðan møguleikarnir kundu teljast á einari hond.

Hóast liðini á vøllinum vóru sera lítið undirhaldandi, so eigur Jens Petur Brattalíð, dómari, rós fyri ikki at leggja dystin fullkomiliga í oyði. Í eyðkendum stíli bríkslaði hann bara, tá veruliga bríkslast skuldi. Fáir steðgir vóru í spælinum, so ferðin ikki heilt fór úr dystinum.

Brattalíð hevði eisini rætt í síni avgerð, tá hann miðskeiðis í fyrra hálvleiki bríkslaði fyri frísparki til Skála, fáar metrar frá brotsteigarmarkinum. Atli Kristiansen, sum var lítið eyðsýndur á miðvøllinum, skuldi eisini vísa seg at standa fyri frægastu royndini hjá gestunum undan hvíldini. Hann sendi høgt upp um málið.

### Sigursmálið

Einsamalla málið í dystinum fall, tá fyrsti triðingurin av seinna hálvleiki var leiktur. Balazs Sinkó hevði í fyrra hálvleiki upplagdan møguleika at leggja heimaliðið á odda, men einsamallur framman fyri málinum rakti hann ikki bóltin, sum Bartal Eliasen hevði lagt fyri føturnar á honum.

Sinkó skuldi gerast dagsins maður hjá fuglfirðingunum, tá hann við høvdinum stýrdi hornasparkið í netið.

Í eini roynd at fáa útjavnandi málið setti John Petersen, venjari hjá Skála, seg sjálvan á vøllin, og hóast hann var millum teir bestu hjá gestunum, so eydnaðist ikki.

Leikliga var ÍF við yvirlutan, og tað fekk avgerandi týdning, at Sinkó tók av einum av fáu møguleikunum hjá heimaliðnum.

Fuglfirðingar vunnu fyri aðru ferð upp í slag, og tað er ikki vanligt í Formuladeildini. John Petersen hevur nógv at hugsa um, áðrenn dystin á Sandi komandi vikuskiftið. Pauli G. Hansen aftur í búnanum hjá Skála í gjár, og hann spældi seinasta hálva tíman. Tað kunnu teir av skálafjørðinum í øllum førum gleðast um.